

## Hava undirskrivað byggisáttmála

Tað verður byggifyritøkan J&K Contractors sum skal leingja flogvøllin í Vágum til 1799 metrar. Tá tilboðini vóru latin upp herfyri hevði J&K lægsta tilboðið. Síðani tá hava samráðingar verið millum J&K og Vága Floghavn, og fyrrpartin varð sáttmálin undirskrivaður. Arbeiðið fer at kosta 131 mió krónur, og er ætlanin at arbeiðið skal byrja um mánaðarskiftið apríl/mai. Eftir ætlan skal tað vera liðugt við árslok komandi ár. Hetta er kortini ikki einasta arbeiðið sum skal gerast har vesturi. Nýggj innflúgvingartól og annað verður eisini gjørt í hesum sambandi.

# Miðbýarætlan løgd fram



**Mikudagin verður nýggja miðbýarætlanin í Klaksvík løgd fram á borgarafundi**

MIÐBÝUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í fleiri ár hava fólk í Klaksvík arbeitt við nýggjari miðbýarætlan. Høvuðsmenn fyri hesum arbeiði hava verið Gunnar Nolsøe og Archibald Black. Teir eru komnir so langt við hesum arbeiði, at mikukvøldið verður ætlanin løgd fram á borgarafundi í Klaksvík.

Klaksvíkar kommuna stendur fyri fundinum, sum verður í Badmintonhøllini í Klaksvík.

Gunvá við Keldu far at siga nøkur orð, Albert Isfeld fer at hugleiða um miðbýir og arkitektur, og síðani sleppa Gunnar Nolsøe og Arcibald Black framat.

Gunnar Nolsøe fer at greiða frá arbeiðnum við miðbýarætlanini, og hvørjir tankar og hugskot liggja til grundar fyri arbeiðnum. Archibald Black fer at vísa fram sjálva ætlanina, hvussu útbygginar skulu gerast, og hvat skal verða hvat í miðbýnum. Skitsur av øllum hesum verða eisini víst-ar fram.

Eftir framløgurnar fáa fólk høvi at koma við viðmerkingum og spurningum, og fólk sleppa eisini at fylla spurnarblað út um miðbýarætlanina.

Fundurin um miðbýin í Klaksvík verður í Badmintonhøllini í Klaksvík mikukvøldið klokkan 19.00.

*Soleiðis hugsa stigtakararnir av nýggju miðbýarætlanini sær, at Klaksvík skal síggja út í komandi tíðum*

# Felags mótmæli ímóti skattum og avgjøldum

**Arbeiðarfeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag eru samd um, at ætlaninar hjá samgonguni at áleggja føroyska vinnulívinum fleiri skattir og avgjøld eru óskiljandi**

POLITIKKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag hava biðið um fund við leiðsluna í samgonguflokkunum fyri at umrøða, hvørjar ætlanir eru í samband við fíggjarlógarkarmin fyri 2011, sum skal leggjast fram í komandi viku.

- Arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag eru samd um, at ætlaninar hjá samgonguni at áleggja føroyska vinnulívinum fleiri skattir og avgjøld eru óskilligar, siga feløgini í felags fráboðan fyrrapartin.

- Stjórnir í londunum kring okkum hava seinasta 1½ árið gjørt skipanir fyri at lætta um hjá vinnulívinum fyri at tryggja arbeiðspláss og virksemi. Alskyns styttri og longri skipanir og serskipanir eru gjørdar, og lond flest royna at stýra ímóti sveigginum í búskapinum fyri at mótvirka fíggjarkreppuni, ið rakar um allan heimin, siga feløgini.

**Gongdin má steðgast**

Tey halda, at í Føroyum verður tað øvugta gjørt, tí tað sæst í fíggjarlógini 2010, og ábendingar eru um, at gongdin heldur áfram.

- Feløgini undrast á, at tað er vinnulívið, har tey flestu av teimum arbeiðsleysu koma frá, sum skal áleggjast fleiri byrðar fyri at fáa landskassaundirskotið niður, siga arbeiðsgevarar og arbeiðarar.

- Tað eru starvsfólk í vinnulívinum, sum standa fyri at skapa tey virðir, sum skulu økja um peningarenslið í almenna kassanum. Tískil er tað tilskundan til meira virksemi í vinnulívinum, sum er leiðin fram fyri at økja um inntøkur landskassans.

Tað er í primervinnunum, at ófaklærdu starvsfólkini starvast, og tað eru tey, sum fyrst gerast arbeiðsleys nú byrðarnar á vinnulívið økjast. Hetta sæst eisini aftur í hagtølunum, sum vísa, at 80% av teim arbeiðsleysu eru ófaklærd.

Arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag eru samd um, at henda gongd má steðgast beinanvegin so fleiri arbeiðspláss ikki fara fyri bakka.

Fráboðanin er undirskrivað av Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroyar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Klaksvíka Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag.